TOM TAILOR • HOUND • FUBU • HEART • FIXONI • ROHDE • PHIL

TM Junior
0-16 ÁR

ÚTSØLAN

BYRJAR MÁNADAGIN 07. JULI KL 9.00

-30% -40% -50%

Vit eru millum Lampubúðina
og Skálabúðina

TM Junior
Dr. Jacobsensgøta 15
Tel 31 10 99

Sosialurin 341800

Mentunarnátt

Ymiskir ljósir
Ruskinnsjakkar
-25% henda dagin

Kallkyn
Vágsbotnur • Tel. 31 62 06

Sosialurin 341800

Føroyski búnin

Vit hava nógv ymiskt til tann føroyska búnan

Til mannfólk:
- Buksuvadmal
- Vestatoy
- Áteknaðir vestar
- Troyggju
- Hosur
- Hosubond

Til konufólk:
- Toy til fyrriklæð og turriklæð
- Toy til skjúrt
- Møtlatoy
- Toy til brist
- Áteknaði fyrikløð
- Liðugt seymað brist
- Maskinbroderað sett til børn
- Liðugt seymað skjúrt og møtlar
- Troyggju
- Og broderÍdukkur

Hygg inn á gólvið

Vit senda um alt landið

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

Sosialurin 341800

Dia Jacobsen tók saman við Asbjørn Hansen, Kristoffur Hentze og Eivind Eysturoy gamla føroyska meti í 4x100 blandað stafett

Metini verða tikin

Í svimjing mikukvøldið endaðu føroyingar bara á teimum aftastu plássunum, men tvey føroysk met vóru tikin í fýra finalum

SVIMJING
Ingrid Bjarnastein

Guernsey: Føroyar vóru við í fýra finalum mikukvøldið. Benthe S. Andersen svam 100 metra bringusvimjing, har hon endaði á einum fimta plássi.

Sjálvt um hon var næstaftast av svimjarunum, so setti hon føroyskt met, so ein kann staðfesta, at støðið á svimjingini he rá oyggjaleikunum er høgt. Gamla metið átti hon sjálv, og tað hevði setti hon í februar í ár.

Hitt føroyska metið tók føroyska stafettin í 4x100 blandað stafett. Dia Jacobsen, Asbjørn Hansen , Kristoffur Hentze og Eivind Eysturoy komu fimtir á máli við tíðini 04.03.08. Hetta metið tóku teir frá Havnar Svimjifelag, og tað var sett í 1999.

Tvær aðrar finalur vóru mikukvøldið. 50 metra frísvimjing fyri kvinnur, har Shaila millum Garðarnar luttók. Hon gjørdist nummar seks við tíðini 28.51 sekund. Eivind Eysturoy svam 100 metra frísvimjing. Har gjørdis hann nummar fimm við tíðini 54.15 sekund.

Føroyingar skuldu væntandi vera við í nøkrum finalum aftur hóskvøldið. Hetta var samstundis eisini seinasta kvøldið hjá føroysku svimjarunum.

Gunnar vann bronsu

Fimta árið á rað hava føroysku súkklararnir fingið heiðursmerki heim við. Hetta er veruleiki, eftir at Gunnar Dahl-Olsen vann bronsu á landavegnum

SÚKKLING
Álvur/Jákup

Guernsey: Føroysku súkklararnir hava støðugt blandað seg í heiðursmerkjatoppin á oyggjaleikunum. Tó at aðrir kanska eru styrkismettir hægri enn okkara, so hevur tað hvørja ferð síðani 1997 eydnast liðnum at fáa okkurt slag av metalli heimvið.

Gunnar var tann, sum fyrst hevði framhjólið innan fyri málstrikuna, og fekk hann soleiðis bronsuna. Gunnar og hinir tríggir, sum komu á næstu plássunum, vóru allir 2 minuttir og 20 sekund aftan fyri vinnandi súkklaran av Man.

Býarkoyring eftir

Sum sagt, so hevur føroyska liðið við hesum longu tryggjað sær fasta heiðursmerkið, men tað var um reppið, at tað kundi verið fleiri enn hetta eina. Í liðkappingin endaðu Føroyar nevnliga á fjórða plássinum, beint aftan fyri Saaremaa.

Bogi Kristiansen, sum altso sat frammi við stór-

Bogi Kristiansen og Gunnar Dahl-Olsen royndu alla tíðina at halda seg frammi í feltinum, og hjá Gunnari gav hetta úrslit í einum bronsumerki

Spurtsigur

Mikudagin var tað so landavegskoyringin, sum var á skránni. Her varð roknað við, at sterkastu føroysku kortini vóru Bogi Kristiansen og Gunnar Dahl-Olsen, og teir báðir fóru eisini alt fyri eitt við í fremra bólkin, tá feltið so spakuliga fór sundur á fyrsta av teimum níggju rundkoyringunum, sum vóru á skránni.

Tó at dúgliga varð roynt at toga sundur, so eydnaðist føroysku súkklarunum alla tíðina at halda seg so nøkunlunda frammi í feltinum. Móti endanum eydnaðist tað tó tveimum av Man at toga seg heilt leysar, og so varð lagt upp til ein øgiligan spurt um bronsuna. Her var Gunnar Dahl-Olsen í bólki saman við trimum øðrum súkklarum, og tað skuldi vísa seg, at spurturin hjá Gunnari var nóg sterkur. Í samlaðum bólki komu teir fýra á málið, men an part av tíðini, gjørdist nummar 15. Sverri Mohr Edvinsson varð nummar 32, og Eli Christiansen kom á mál sum nummar 35.

Og fríggjadagin verður tað so, at súkklararnir skulu royna seg í býarkoyringini. Her hevur Bogi Kristiansen eitt bronsumerki av Man at verja, og tað verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at spæla av hesaferð.

Van Gogh verður í Hetlandi

Mikudagin kom ferðamannaskipið Van Gogh til Guernsey. Van Gogh verður flótihotell á oyggjaleikunum í Hetlandi í 2005

OYGGJALEIKIR
Ingrid Bjarnastein

Ferðamannaskipið Van Gogh skal brúkast sum flótihotell á oyggjaleikunum 2005

Guernsey: Til oyggjaleikirnar í 2005 verður tað eitt ferðamannaskip, sum kemur at hýsa gestum og ítróttarfólkum. Ferðamannaskipið verður leigað til endamálið av tí, at hotellini ikki megna at geva øllum teimum ferðandi innivist.

Talan er um ferðamannaskipið Van Gogh. Van Gogh er skrásett í Kingston í Jamaica, men hevur bústað í Glostershire í Onglandi.

Mikudagin kom ferðamannaskipið til Guernsey, har altjóða oyggjaleikanevndin fekk høvi at síggja skipi.